# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vinnudagur eitt gott tiltak

Neyvan nakran dag á árinum er høvi at síggja so mong andlit úr føroyska vinnulívinum savnað á einum stað sum á Vinnudegnum í Norðurlandahúsinum. Hetta afturvendandi tiltakið er komið fyri at vera og gott tað sama, tí her er talan um eitt bæði spennandi og gott tiltak. Vinnulívsfólk úr øllum landinum og umboðandi allar hugsandi vinnur seta hvørjum øðrum stevnu henda dagin í september. Umframt at hoyra fleiri áhugaverdar fyrilestrar er hesin dagurin eisini gott høvi at hitta starvsfelagarar – tosa um tað farandi og tað komandi. Eingin ivi um at her verða eisini bygdar brýr og hvør veit, kanska eisini brotið upp úr nýggjum.

Kjarnan í vinnudegnum er kjósanin av besta virkinum í Føroyum. Og hesaferð tók dómsnevndin tí skilagóðu avgerð at lata stóra og fjølbroytta reiðaríinum Thor í Hósvík henda heiður. Talan er um eitt reiðaravirki, sum støðugt hevur brotið upp úr nýggjum. Tað hevur lagt seg eftir ótraditionellum fiskasløgum og fiskileiðum við góðum úrsliti, og hevur um somu tíð við hegni differentierað sítt virksemi til eisini at fevna um tænastur innan oljuleiting, har tað veitir hjálpar¬skipatænastur til frálandavinnuna í 50 londum kring allan knøttin (Evropa, Asia, Suður- og NorðurAmerika og Afrika) sigur dómsnevndin.

Eingin ivi um at hetta var eitt gott val. Thor hevur víst føroyingum, at tað ber til at fáa lønandi virksemi við øðrum enn bert fiski og tað í útlandinum eisini. Vit vilja ynskja øllum starvsfólkinum hjá Thor hjartaliga tillukku eins og Vinnuhúsinum góða eydnu við framtíðar tiltøkum.

Umframt at kjósa besta virkið var aftur hesaferð valt út fyritøka, sum fekk heiðurin "Ársins Átak, og hesaferð fall valið á blaðið Vinnuvitan. Í niðurstøðu síni leggur dómsnevndin dent á týdningin, at tað finst eitt blað í Føroyum, sum burturav tekur sær av vinnulívstilfarinum. Vit vilja eisini ynskja starvsfeløgunum á Vinnuvitan tillukku við heiðurinum, sum vónandi eisini kann virka kveikjandi fyri restina av pressuni, soleiðis at eisini tíðindabløðini, sum koma út hvønn gerandisdag, fara at gera meira burtur úr vinnulívinum. Sosialurin og Miðlahúsið fara í framtíðini at bjóða seg fram at viðgera vinnuna meira miðvíst við ymsum átøkum í blaðnum og í húsinum. Karmarnir her eru góðir til bæði at menna og byggja brýr – eitt nú millum vinnu og mentan – t.d. við positivum upplivingum.

**Sosialurin**

## Um rasismu í fótbólti

JÁKUP MØRK
Ítróttarskrivari

**Ein treytaleys umbering til Hans Paula Samuelsen, Ronnie Samuelsen og felagið, EB/Streymur**

Í hósdagsútgávu okkara í farnu viku tók yvirritaði eitt mál til viðgerðar, sum - ikki óvæntað - vísti seg sera eldfimt. Nevnliga rasismu innan føroyska fótbóltsheimin.

Útgangsstøði fyri greinunum um evnið var, at Alex José Dos Santos úr B36 tók til orðanna móti einum fyribrigdi, sum hann hevur kent seg sum offur fyri stóran part av tíðini, sum hann hevur verið í Føroyum. Tað vil siga tíðini, sum hann hevur verið á fótbóltsvøllinum í Føroyum, tí í aðrar mátar leggur hann dent á, at hetta ikki hevur verið ein trupulleiki.

Frá fólki í og kring felagið, EB/Streymur, havi eg fingið fleiri ábreiðslur fyri, at greinin tók útgangsstøði í dystinum á Eiði - herundir serstakliga tveimum spælarum. Og er tað so, at lesarin hevur uppfatað greinina sum eitt álop móti EB/Streymi ella tess spælarum, vil eg staðiliga rudda allar misskiljingar av vegnum.

Endamálið við at seta hol á hetta evnið var at varpa ljós á ein trupulleika, sum eftir øllum at døma hevur ligið alt ov væl fjaldur í føroyska fótbóltsheiminum. Er hetta uppfatað so, at talan er um serstakt fyribrigdi við vøllin á Mølini, er hetta misskilt.

At eg sum blaðmaður kortini valdi at seta navn á tveir spælarar, sum sambært Alex høvdu verið partur av hesum, hevur víst seg sum ein skeiv meting frá mínari síðu. Endamálið við skrivingini var alla tíðina at seta fokus á trupulleikan, og ikki at heingja nakran persón út. Í einum somikið kenslubornum máli er tað av alstórum týdningi, at orðini verða rætt vigað, og eg má ásanna, at tað havi eg ikki megnað nóg væl í hesum førinum.

Í greinini vóru brøðurnir Ronnie og Hans Pauli Samuelsen úr EB/Streymi, nevndir sum tveir av spælarunum, sum Alex José Dos Santos segði seg verða niðraðan av, í fyrra hálvfinaludystinum á Eiði í farnu viku.

Hetta eru sera álvarsligar ákærur at seta fram, og tá eg ikki havi prógv fyri at hesar ákærur eru sannar, og Ronnie og Hans Pauli hartil harðliga afturvísa at teirra ákoyringar móti Alex José Dos Santos hevði nakað sum helst samband við uppruna ella húðarlit, men harafturímóti við framferðarhátt hansara móti einum av EB/Streymaleikarunum, vil eg hervið biðja teir og EB/Streym um eina treytaleysa umbering.

Greinin var bygd á óítøkiligar pástandir frá einum leikara, sum kunnu verða sera torførar at afturvísa frá mótpartinum. Tá slík álvarslig grein verður skrivað, eigur útgangsstøðið at vera ítøkiligt, har báðir partar hava javnbjóðis møguleika at koma til orðana. Ein annar háttur er eisini at taka trupulleikan upp sum ein generellan trupulleika, og tá eigur úttalilsi frá einum leikara um ein einstakan dyst ikki at liggja til grundarlag fyri greinini.

Vónandi eru EB/Streymur og umtalaðu leikararnir ikki settir í ringt ljós av greinini, tí hetta var ongan tíð ætlanin. Og eg havi heldur ongar ábendingar um at EB/Streymur og leikarar tess á nakran hátt eru ørvísi enn onnur feløg og aðrir leikarar.

Eftir er at vóna, at hond nú verður tikið um sjálvan trupulleikan av teimum, sum onkursvegna varða av føroyskum fótbólti. Vit eiga øll eina medábyrgd av, at spælið verður verandi spæl, heldur enn ein leikpallur, har alt er loyvt.

*Søgan um Páll:*

## Rættartrygdin hjá borgarunum í fríum falli

ÓLI JACOBSEN



Tann, sum fylgir tað allarminsta við, veit, at føroyski borgarin verður meira og meira rættarleysur og er víst á hetta í nógvum greinum í FF-blaðnum, sum finnast á okkara heimasíðu, www.fiskimannafelag.fo har eisini henda grein verður løgd inn..

Rættartilvitanin í politisku og almennu politisku skipanini versnar so líðandi. Afturat hesum kemur, at tað finst eingin politikkur viðvíkjandi rættartrygd. Tað finnast ongar skipaðar mannagongdir fyri hvussu mál skulu avgreiðast, og øll sum hava makt, gera stórt sæð, sum tey vilja, uttan at nakar setur nakað upp á pláss.

Tískil er borgarin á "herrens mark", sum tað eitur.

**Søgan um Páll**

Tað seinasta dømi um hetta er søgan um Páll. 19. oktober komandi kundi hann havt 25 ára starvsdag sum lærari á Maskinmeistaraskúlanum, ella sum tað nú eitur Vinnuháskúlanum.

Tá plaga menn at verða heiðraðir fyri trúfesti í arbeiðinum. Men hetta ætlar stjórin ikki skal henda. Hann vil varpa Páll út av skúlanum longu 1. oktober nærum sum ein brotsmann. Orsøkin skal vera illoyalitetur móti arbeiðsplássi og starvsfelaga.

Hendan metingin av Páll er beint mótsett av tí skoðsmáli, sum fyrrverandi stjóri á Maskinmeistaraskúlanum Magnus Simonsen gevur Páll, sum hann hevur samstarvað við í mong ár og eisini hevur havt sum næming.

Magnus sigur í samband við aktuella málið:

*Loyvi mær eisini at siga, at eg eri so skelkaður, sum nakað menniskja kann blíva tað, av tí viðferð, sum Páll hevur fingið. Eg var stjóri hjá Páll alla tíð, meðan eg var á skúlanum. Skúlin (skúlastjórin og lærararnir) kendi altíð ein tryggleika at líta Páll uppgávur upp í hendur, tí hann hevur roynst at vera ein álítandi trúfastur maður, sum er dúgligur til altíð at gera tað, hann verður biðin um. Hansara partur hevur ongantíð ligið eftir, tá tað hevur verið talan um at menna skúlan. Tá hann nú við sínum likamliga veikleika verður soleiðis viðfarin, sum skjótt alt Føroya fólk veit um, tá má eg siga, at eg eri skelkaður inn at sálini. Góðu tit, sum hava ábyrgd og avgerðarrætt:* ***Biðið Páll um treytaleysa umbering*** *fyri ta viðferð, tit hava givið honum, eftir at hann í skjótt 25 ár í trúfesti hevur tænt Maskinmeistaraskúlanum*

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.